TRYGD • TÆNASTA • TRIVNAÐUR

- størri TRYGGLEIKA í ferðsluni

# SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akstovuna til at byrja skjótast tilber. Talan er um parttíðarstarv.**

**UPPGÁVAN**

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Sýnsumsiting

**FØRLEIKAKRØV**

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á at ein hevur góð samstarvsevni og at viðkomandi er fyrikomandi og tænastuhugaður. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jákup Jacobsen, stjóra, á telefon 350400.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í **seinasta lagi 20. august 2007.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjald og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir kring alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

AKSTOVAN

Hoyvíksvegur 57 • Postsmoga 3206 • FO-110 Tórshavn
Tel. 35 04 00 • Fax 35 04 01 • www.akstovan.fo • akstovan@akstovan.fo

# Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til projektering og eftirlit innan byggi- og anleggsarbeiði, har arbeiðsøki í høvuðsheitinum fevnir um projektering av stál- og betongkonstruktiónum.

Vit leggja dent á góð evnir at samstarva, og at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst.

Neyðugt er at hava kunnleika til arbeiði við AutoCad, Word og Excel. Telduforrit til statik v.m. kunnu lagast eftir egnum ynski, um tú ert vanur við onnur enn tey vit nýta.

Vit kunnu bjóða góðar arbeiðsumstøður og løn í mun til útbúgving og royndir. Møguligar útreiðslur í samband við flyting verða endurgoldnar sambært avtalu.
Hóast tú nýliga ert liðug/ liðugur við útbúgvingina ert tú vælkomin at søkja.

Skrivlig umsókn við viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan 17.08.2007.
Umsóknin verður viðgjørd í trúnaði.

Nærri lýsing av starvinum kann fáast við at venda sær til Magnus P. Gaard á 515581, teldupostur mpg@vfs.fo

**Verfrøðingastovan**
Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.
Mannbrekka 16, FO 188 Hoyvík
Telefon 315294, mail-vfs@vfs.fo

# Manningarsamskipari

Søkt verður eftir nýggjum manningarsamskipara til Sjódeildina, ið hevur ábyrgd av øllum skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins. Á Sjódeildini starvast 3 fólk.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan verður at tryggja, at skipini eru mannaði sambært galdandi krøvum, herundir syrgja fyri at manningarnar altíð eru uppdateraðar við kravdum skeiðum, gera vaktarskipanir og viðlíkahalda manningaryvirlitini fyri skipini.
Aðrar uppgávur eru at vera við til at gera fíggjarætlan og fyrifallandi uppgávur.

**Umsøkjarar**
Vit vænta at tú hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi royndir, dugir væl at brúka tekstviðgerð, rokniark og dátabasu. Ein fyritreyt er, at tú dugir væl at orða teg, bæði munnliga og skrivliga. Vit vænta at tú ert lættur at samstarva við, tolir broytingar og megnar at hava nógv um oyrini samstundis. Tú mást eisini tola, at starvið mangan kann verða krevjandi og harvið órógvandi.

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt spennandi og ábyrgdarfult starv, har góður møguleiki er fyri menning.
Løn og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn og setan**
Umsóknir skulu sendast til Strandfaraskip Landsins, att. Starvsfólkadeildin, boks 88, FO – 100 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. august 2007 kl. 13:00.

Starvið verður at seta skjótast til ber. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at seta seg í samband við Nainu Samuelsen á 543044.

Arbeiðsstaðið er í Tórshavn til uml. 1. januar 2008, og verður síðani flutt til Tvøroyrar.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk.

# Samferðsluleiðari

Søkt verður eftir leiðara til Samferðsludeildina at byrja skjótast møguligt

**Samferðsludeildin**
Høvuðsuppgávan hjá Samferðsludeildini er at skipa almennu felagsferðsluna, herundir fólkaflutning og farmaflutning. Vit leggja til rættis, stýra, selja, samskipa og kunna um felagsferðsluna á sjógvi og landi.

Arbeiðsøkið hjá deildini er millum annað: ferðaætlanir, prísskipan, útbjóðing, ferðaseðlaskipan, ferðslusamskipan, rutuupplýsing og farmaflutningur.

**Uppgávan hjá leiðaranum**
Leiðarin skal tryggja ein effektivan rakstur og stýra fíggjarligu karmarnir innan økið. Harumframt skal leiðarin tryggja eina framhaldandi menning av deildini.

Starvið er breitt og spennandi, har tú eisini kemur at arbeiða við fakligum uppgávum innan felagsferðslu, herundir analysur, planlegging og dagliga samskipan. Arbeiðið á deildini er í stóran mun skipað við verkætlanum.

**Førleikakrøv**
Vit rokna við, at tú hevur útbúgving innan búskap ella verkfrøði. Royndir innan flutningsskipanir og projektarbeiði er ein fyrimunur. Tú skalt kunna arbeiða málrættað, og tú hevur góð analytisk evni. Eisini er tað ein treyt, at tú hevur góðan telduførleika og góðan málsligan førleika. Tú hevur góð leiðslu- og samstarvsevnir, og tú skalt kunna arbeiða undir trýsti og kunna hava nógvar bóltar í luftini í senn.

**Setanartreytir og umsókn**
Starvið er lønt í 35 lønarflokki hjá tænastumannafelagnum, tó uttan at starvið er tænastumannastarv.
Arbeiðstaðið er í Tórshavn til uml. 1. januar 2008, har tað síðan verður á Tvøroyri.

Umsókn v.m. skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-100 Tórshavn

Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. august 2007 kl. 13:00.
Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Regin Vágadal, stjóra, á 343012.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Samlaða talið av ferðafólkum við SSL í 2006 var 1,1 millión: 620 túsund við bussunum og 480 túsund við ferjunum. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk.